## Fangar fáa samsýning

Flóðaldan annan jóladag í fjør gav fleiri hundrað indonesiskum fangum høvi at rýma úr fongslunum, men tað vóru kortini minni enn so allir, ið tóku av tí sjáldsama tilboðnum.

Fleiri hundrað fangar valdu heldur at hjálpa bjargingarliðunum, og nú hevur indonesiska stjórnin gjørt av at samsýna teimum fyri tað. Hamid Awaluddin, løgmálaráðharri, sigur við BBC, at stjórnin hevur gjørt av at skarva helmingin av fongsulstíðini hjá umleið 300 fangum, aftur fyri at teir hjálptu bjargingarliðunum. Indonesisku myndugleik-arnir plaga at linna revsingar hjá fangum í sambandi við tjóðardagin, sum er 17. august, men tá er vanliga bara talan um at skarva nakrar mánaðir av revsingini.

Landsparturin Aceh fór sera illa av jarðskjálvtanum og flóðalduni annan jóladag, sum kravdu umleið 130.000 mannalív har. Fleiri fongsul fóru illa, og nógvir fangar druknaðu, tí teir sluppu ikki úr teimum stongdu klivunum, sigur BBC.

## Kvinnur tosa meiri enn menn

Menn hava leingi vitað, at tað er so, og kvinnurnar vita tað kanska eisini, men nú er tað so staðfest, at kvinnur tosa nógv meiri enn menn.

Ein kanning í Týsklandi vísir, at kvinnur siga umleið 24.000 orð um dagin ella tvær ferðir meiri enn menninir. Hinvegin kemur kanningin til ta niðurstøðu, at menn siga ofta annað enn tað, sum teir veruliga meina, og tí hevur forlagið Lagenscheidt givið út eina bók, sum skal hjálpa teimum báðum kynunum at skilja hvørt annað. Bókin er ætlað kvinnunum. Bókin til menninar kom út í fjør.

Susanne Froehlisch, sum hevur verið við til at skriva bókina, sigur við Reuters, at tað er ikki altíð so heppið, at menn tosa minni enn kvinnur. Eitt nú hevur tað víst seg, at í Týsklandi velja nógvar kvinnur at skiljast, tí menninir siga ov lítið.

## Ísurin tiðnar

Í Týsklandi bera myndugleikarnir ótta fyri, at um tjúgu ár verður eingin ísur eftir á landsins hægsta fjalli, Zugspitze.

Nú um dagarnar var umhvørvismálaráðharrin í Bayern, Werner Schnappauf, uppi á á tí 2962 metrar høga fjallinum, og hann segði seg vera skelkaðan av at síggja, hvat er í ferð við at henda. Hann segði seg ikki ivast í, at tað er tann veksandi hitin á Jørðini, sum ger, at ísurin á Zugspitze tiðnar, tí sambært kanningum er meðalhitin í Alpunum hækkaður næstan tvey stig seinastu 70 árini. Werner Schnappauf segði, at gongdin fer at fáa óhepnar avleiðingar fyri tey nógvu vetraríttróttarstøðini har suðuri í Týsklandi, tí frostdagarnir fækka skjótt, segði hann.

Týskir vísindamenn hava roknað út, at ein heitan summardag renna umleið 35 milliónir litrar av vatni oman av Zugspitze. Tað svarar til ta dagligu vatnnýtsluna í einum býi við knappliga 300.000 íbúgvum, siga teir.

## Avdúkingar um Hitler

Ein sending, sum kemur í týska sjónvarpið ZDF næsta týsdag, avdúkar ymisk viðurskifti hjá nazileiðaranum Adolfi Hitler og hansara næstu.

Undir rannsóknum eru tveir søgufrøðingar komnir fram á eina dagbók hjá Paulu Hitler, sum var systir Adolf. Har sæst, at pápi teirra var sera harðligur, og at hann javnan bukaði bæði børnini, sjálvt um mamman royndi at verja tey sum best. Men Adolf var lítið mætari, tí hann gjørdi seg ofta inn á ta sjey ár yngru systrina. Millum annað sló hann hana fleiri ferðir í andlitið.

Søgufrøðingarnir Timothy Ryback og Florian Beierl siga, at uppvøksturin hjá Adolfi Hitler hevði stóra ávirkan á hann, og at í veruleikanum bleiv ágangurin hjá ríki hansara grundlagdur longu tá. Teir vísa á, at sambært einum skjali, sum teir hava funnið, gav Hitler boð um, at ein av hansara egnu skyldkonum í gasskamarið, tí hon leið av tunglyndi. Eftir uppfatanini hjá Hitleri var hon ikki egnað at liva, siga søgufrøðingarnir við bretska blaðið The Guardian.

## UTTAN ÚR HEIMI



# 60 ár síðani Hiroshima

**Í dag eru 60 ár, síðani amerikanararnir sleptu kjarnorku-bumbuni niður yvir japanska býin Hiroshima.**

MINNI
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Klokkan 8.16 tann 6. august í 1945 skein ljósið so bjart sum ongantíð fyrr uppi yvir japanska býnum Hiroshima, og sekundini og minuttirnar aftaná doyðu fólk í túsundatali. Tann fyrsta kjarnorkubumban hevði staðið sína roynd sum krígsvápn.

Eingin veit við vissu, hvussu mong fólk doyðu í Hiroshima tann 6. august og mánaðarnar aftaná. Alment bleiv sagt, at bumban kravdi 80.000 mannalív, men tá árið var av, høvdu umleið 140.000 latið lív av sjálvari bumb-uni og teimum avleiðing-um, sum hon hevði við sær. Tað var næstan helm-ingur-in av øllum fólkinum í býnum.

Tríggjar dagar, tann 9. august, seinni sleptu amerikanararnir enn einari kjarnorkubumbu. Hesaferð var japanski býurin Naga-saki álopsmálið. Almenna talið á deyðum var um 40.000, men sam-bært japonsku myndugleikunum var tað endaliga talið umleið tað tvífalda.

Tann 15. auigust kunn-gjørdi japanska stjórnin, at landið gavst við bardaga-num ímóti teimum sam-eindu, og harvið var seinni heimsbardagi av.

# Putin ætlar at verða sitandi

**Russiski forsetin viðgongur, at hann vil fegin sleppa at halda fram í embætinum aftan á næsta val.**

RUSSLAND
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tá hetta valskriðið rennur út, hevur Vladimir Putin verið russiskur forseti í átta ár, men hann vil fegin sleppa at halda fram aftan á valið í 2008. Trupulleikin er, at sambært grundlógini kann forsetin ikki sita longri enn tvey fýra ára skeið á gangin.

Men tað er ikki verri enn so, at grundlógin kann broytast, um tjóðartingið tekur undir við tí. Tann størsti flokkurin, Tað Sameinda Russland, tekur undir við hugskotinum, og sambært tíðindastovunum taka flestu russar eisini undir við tí.

Putin sjálvur dylur ikki fyri, hvat hann heldur.

-Eg hevði ivaleyst stillað uppaftur næstu ferð, men grundlógin loyvir tí ikki, segði Putin, tá hann sein-asta týsdag var í Finnlandi og virjaði.

Hetta er fyrstu ferð, at russiski forsetin harmast avmarkingina í grundlóg-ini. Hann nam eisini við spurningin, tá hann var í Týsklandi í apríl, men tá segði hann kortini einki um, at hann kundi hugsað sær at stilla uppaftur.

Summir russiskir eyg-leiðarar halda, at eydnast tað ikki Putin at stilla upp í 2008, verður hann helst forsætisráðharri ístaðin fyri, og at hann so fer at stilla upp á forsetavalinum aftur í 2012.



*Vladirmir Putin hevur hug at halda áfram í forsetaembætinum.*

Putin er ikki so væl umtóktur ímillum russar, sum hann onkuntíð hevur verið, men tað er kortini eingin, sum kann bjóða honum av. Meiningakann-ingar hava víst, at serliga tær russisku kvinnurnar halda nógv av honum.